| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 11. desember 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 14/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 11. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 05. desember 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen
Símun Jákup Eliassen

Símun Jákup Eliassen á lista B møtti sum varalimur fyri Sigurð Simonsen, sum hevði boðað frá forfalli til fundin, eins og hann eisini metir seg ógjegnigan til at viðgerða málini sum viðvíkjandi P/F Sandgrevstur. Atli Larsen, sum er fyrsti varalimur metir seg eisini ógjegnigan til at viðgerða mál, sum viðvíkja P/F Havsbrún vegna svágd við stjóran á Havsbrún.

Áðrenn fundurin byrjaði kunnaði borgarstjórin sambært uppriti frá Eyðbjørn Larsen, løgfrøðingi, dagfest 11. desember 2014, býráðið um, at býráðsskrivarin er svágdur við stjóran á P/F Havsbrún, men at mett verður, at hetta ikki er trupulleiki, tí hesin bert førir gerðabókina og hevur einki havt við mál nr. 2 og 3 at gera, nú býráðið viðgerð hesi og tekur avgerðir. Hann kann sambært uppritinum ikki verða ráðgevi á fundinum í nevndu málum.

Hesi niðurstøðu tók býráðið undir við. Sostatt er avgerð tikin um, at býráðsskrivarin verður skrivari, meðan mál nr. 2 og 3 verða viðgjørd og avgerð tikin, men verður tó ikki ráðgevi.

Vinnunevndin hevði broyting til fundarskránna, soleiðis at mál nr. 49/2014 verður flutt til mál nr. 48/2014, t.v.s. at tilmæli frá vinnunevndini frá 04. desember 2014 um uppbýting av økinum millum Havsbrún og Sandgrevstur vm. verður viðgjørt fyrst. Uppskotið fall. 4 atkv. fyri og 5 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu Magnus S. Midjord, Eyðun á Lakjuni, Birgir Petersen og Símun Jákup Eliassen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 47/2014.**

**Uppskot frá borgarstjóranum um almennar býráðsfundir í 2015.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 05. desember 2014, har skotið verður upp, at almennu býráðsfundirnir fyri 2015 verða hildnir niðanfyri standandi hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum, hetta vísandi til § 13, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri:

29. januar, 26. februar, 26. mars, 30. apríl, 28. mai, 18. juni, 27. august, 24. september, 29. oktober, 26. november og 10. desember.

Spurningurin verður eisini reistur, og fundartíðin skal verða broytt frá kl. 16.30 til 17.00, men hetta er eitt mál, sum býráðið eigur at taka endaliga avgerð til.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við uppskotinum frá borgarstjóranum og at fundartíðin verður sett til kl. 17.00. (9-0).

**Mál nr. 48/2014.**

**Umsókn frá P/F Havsbrún um byggiloyvi til mjølgoymslu.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Havsbrún, dagfest 03. oktober 2014 um byggiloyvi til mjølgoymslu á økinum sunnanfyri Laksavirkið.

Vísandi til býráðssamtykt frá 19. juli 2014 um prinsippielt byggiloyvi og 25. september 2014 um staðseting av bygninginum, mælir tekniska nevndin á fundi 03. desember 2014 býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging av mjølgoymslu samb. fyriliggjandi umsókn.

Bygningurin kann ikki uttan loyvi frá kommununi nýtast til annað enn mjølgoymslu.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá Magnusi S. Midjord um at beina málið aftur í vinnunevndina fall. 4 atkv. Fyri og 5 atkv. Ímóti. Fyri atkvøddu: Magnus S. Midjord, Eyðun á Lakjuni, Birgir Petersen og Símun Jákup Eliassen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein.

Broytingaruppskot frá Eyðuni á Lakjuni: Undirritaði mælir til, at P/F Sandgrevstur fær tað økið til at byggja bygning á sambært uppskotinum frá vinnunevndini frá 04. Desember 2014. Uppskotið fall. 4 atkv. Fyri og 5 atkv. Ímóti. Fyri atkvøddu: Magnus S. Midjord, Eyðun á Lakjuni, Birgir Petersen og Símun Jákup Eliassen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein.

Atkvøtt varð til seinast um tilmælið frá teknisku nevndini og varð hetta samtykt. 5 atkv. fyri, 2 atkv. ímóti og 2 atkv. vórðu blankar. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein. Ímóti atkvøddu: Magnus S. Midjord og Eyðun á Lakjuni. Blankt atkvøddu: Birgir Petersen og Símun Jákup Eliassen.

*Viðmerking frá Eyðuni á Lakjuni, Magnus S. Midjord og Birgiri Petersentil gerðabókina.*

Undirritaðu vilja gera vart við, at grundað á at málsviðgerðin av málinum sum heiild als ikki hevur verið nøktandi, og at líkheitsprinsippið ikki heveur verið rættvíst, so atkvøddu nevndu býráðslimir ímóti tilmælinum frá teknisku nevndini og blankt.

**<u>Mál nr. 49/2014</u>**

**Umsókn frá P/F Sandgrevstur um byggiloyvi til goymslubygning á havnalagnum**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Sandgrevstur, dagfest 20. november 2014 um byggiloyvi til goymslubygning á havnalagnum.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 04. desember 2014 og mælir til, at umsókn felagsins verður gingin á møti, soleiðis at teir fáa uml. 1000 til 1100 fermetrar av tøka økinum sunnanfyri Laksavirkið til hetta endamál. Áðrenn bygt verður skal byggiloyvi frá kommununi fyriliggja. Býráðssamtyktin um nevnda økið frá 25. sept. 2014 jr.nr. 14/00123 verður broytt samsvarandi hesum.

Víddin á stykkinum, felagið søkir um, er góðar 1000 fermetrar, og er ætlanin at byggja ein goymslubyggning á alt økið.

Til kunningar kann vísast á, at Sandgrevstur hevur mist á leið 2300 fermetrar til sandgoymslu, ið svarar til 70% av tøka økinum, felagið hevði áður.

Vinnunevndin vil eisini mæla býráðnum til at lata P/F Havsbrún grannastykkið, ið hevur eina vídd á 1500 til 2000 fermetrar til at byggja ein mjølgoymslubygning á.

Til kunningar kann eisini vísast á, at Havsbrún disponerar sum er á einum øki, sum er umleið 35.000 fermetrar í vídd.

Í løtuni er kommunan í holtur við at planera øki út í sjógvin frammanfyri fóðurdeildini hjá Havsbrún à 4.000 fermetrar.

Vinnunevndin fer eisini at skjóta upp, at farið verður inn í fjallið so skjótt sum gjørligt við tí endamáli at taka grót út til planering undir nýggja Vónavirkinum á Enninum, og til fylling í samband við leingjan av frystikajuni. Í tí sambandi fær Havsbrún møguleika til at fáa tað mjølgoymslupláss, ið teimum tørvar inni í fjallinum beint aftan fyri mjølverksmiðjuna.

*Framtíðarstøðan hjá Havsbrún:*

1. Klárt at byggja 3000 fermetrar stóra fóðurgoymslu um 4 – 5 mánaðar. Goymlan kann vaksast eftir tørvi, - also framtíðartryggjað útbygging.
2. Mjølgoymsla inni í fjallinum klár at taka í nýtslu um eitt ár. Goymslan kann vaksast eftir tørvi, - also framtíðartryggjað útbygging.

Sæð í ljósinum av, at Havsbrún innan stutta tíð verður 100% nøktað hvat goymsluplássi viðvíkur, heldur vinnunevndin tað verða rætt at lata P/F Sandgrevstur fáa hesar 1000 fermetrarnar at byggja á.

Meðan hetta mál varð til viðgerar, fór Sigurð S. Simonsen av fundi vegna ógegni. Sum eykalimur fyri hann møtti Eyðun á Lakjuni.

**Avgerð:**
Við tað at mál nr. 48/2014 varð samtykt, so fall mál nr. 49/2014 burtur.

**<u>Mál nr. 50/2014.</u>**

**Mál viðvíkjandi 2. viðgerð av eykajáttan til íløgur í Stropan.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið frágreiðing frá fyrisitingini um, at avsettar eru kr. 310.000,00 til íløgur í Stropan, rakstrarstað 03261153110 konto 310001 fyri 2014, men sambært fyriliggjandi uppgerð, so eru nýttar kr. 559.148,00 ella kr. 249.148,00 meira enn mett.

Tá eru rokningar upp á kr. 87.578,50 frá Heildarverk frá 2013 tiknar við. Hetta eru sum lýst rokningar frá 2013, sum Fuglark hevur ligið inni við, og sum kommunan ikki hevur móttikið fyrr enn í oktober 2014.

Haraftrat er staðfest, at ein sølufakturi fyriliggur frá Innspark.fo upp á kr. 373.468,75 til íløgur í spælipláss við Stropan, og her er avtala gjørd millum kommununa og felagið um, at kr. 300.000,00 skulu rindast í 2014 (er flutt) og restin kr. 73.468,75 skulu rindast í 2015.

Sostatt verður talan um eina samlaða nýtslu til íløgur í Stropan upp á kr. 633.000,00, sum er 333.000,00 omanfyri ta játtan, sum býráðið hevur samtykt at veita íløgum í Stropan á fíggjarætlanini fyri 2014.

Við tað at nevndin ikki hevði rætt grundarlag at viðgera eykajáttanina, so varð boð sent eftir býarverkfrøðinginum, sum møtti á fundinum. Hann greiddi frá rokningunum hjá Heildarverk, har hann hevði spurt eftirlitið fyrst í árinum, um nakrar rokningar fyri 2013 lógu eftir. Svarið varð noktandi. Býarverkfrøðingurin greiddi frá, at talan var um rokningar fyri eykaarbeiðir, sum felagið hevði gjørt, og at hesi ikki vórðu umfatað av tilboðnum í sambandi við bygging av Stropanum.

Hinvegin upplýsti hann, at Fuglark ikki hevði sent kommununi rokningar fyri eftirlit í langa tíð, og kundi talan verða um sera stórar upphæddir eitt í ringasta føri milliónir.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi 22. oktober 2014 og varð avgerð tikin um , at fundur skuldi verða hildin við Fuglark beinanvegin fyri at fáa greiði á fíggjarligu viðurskiftiunum, áðrenn ein endalig viðgerð kom at verða av eini møguligari eykajáttan til íløgur í Stropan.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. November 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 333.000,00 til íløgur í Stropan, rakstrarstað 03261153110 konto 310001 fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Fíggingin verður fingið til vega av meirinntøkum av A+B skatti, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Staðfest er pr. d.d., at kommunan hevur fingið umleið kr. 3,7 mió. meira í kommunuskatti enn mett teir fyrstu 10 mánaðarnar av árinum.

Sostatt metir nevndin, at eingin trupuleiki skuldi verið fyri, at eykajáttanin verður veitt av meirskatti. Tó hevur kommunan framt eykajáttanir higartil fyri kr. 3.170.000,00, sum eru fíggjaðar av meirskatti og møguligari lántøku.

Ein eykajáttan, sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í kinsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. Viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

Málið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi 27. November 2014 og varð samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 11. desember 2014. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigga Óladóttir Joensen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttanina til íløgur í Stropan, hett sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini í málinum. 8-0().

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigga Óladóttir Joensen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 51/2014.**

**Mál viðvíkjandi 2. viðgerð av eykajáttan til rakstur til Stropan.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 07. november 2014 um, at játtanin til Stropan ikki strekkir til restina av árinum. Í hesum sambandi verður víst til umsókn frá Stropanum, dagfest 06. november 2014 við frágreiðing til sosialu nevndina um eina møguliga eykajáttan til hall á kr. 100.000,00.

Talan er í stóran mun um ovurnýtslu í sambandi við lønum til avloysarar, og at einki er avsett til arbeiðsmarknaðargjøld, umleið kr. 130.000,00, ið er orsøkin til hallið.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar í sosialu nevndini tann 07. November 2014 og tekur nevndin undir við áheitanini frá Jógvani Philbrow, leiðara á Stropanum, og heitir á fíggjarnevndina um at veita eina eykajáttan til rakstur á Stropanum upp á kr. 100.000,00.

Sambært fíggjarætlan kommununar fyri 2014 eru avsettar kr. 4.050.000,00 á rakstrarstaði 03261153015 konto 110001, so um ein eykajáttan verður veitt á kr. 100.000,00, so verður játtanin hækkað upp í kr. 4.150.000,00. Sambært budgetsaldolistanum eru pr. d.d. nýttar kr. 3.654.994,00 til fastar lønir, tímalønir, eftirlønir og arbeiðsmarknaðargjøld.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. november 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 100.000,00 til rakstur í Stropan, rakstrarstað 03261153015 konto 110001 fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Fíggingin verður fingið til vega av meirinntøkum av A+B skatti, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Staðfest er pr. d.d., at kommunan hevur fingið umleið kr. 3,7 mió. meira í kommunuskatti enn mett teir fyrstu 10 mánaðarnar av árinum.

Sostatt metir nevndin, at eingin trupuleiki skuldi verið fyri, at eykajáttanin verður veitt av meirskatti. Tó hevur kommunan framt eykajáttanir higartil fyri kr. 3.170.000,00, sum eru fíggjaðar av meirskatti og møguligari lántøku.

Ein eykajáttan, sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í kinsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

Málið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi 27.nNovember 2014 og varð samtykt at taka taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 11. desember 2014. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigga Óladóttir Joensen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttanina til rakstur í Stropan, hett sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini og sosialu nevndini í málinum. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigga Óladóttir Joensen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 52/2014.**

**Mál viðvíkjandi 2. viðgerð av eykajáttan til "Ung í arbeiði"**

Fíggjarnevndin hevur móttikið fráboðan frá fyrisitingini um, at játtanin, sum býráðið hevur veitt til ung í arbeiði á fíggjarætlanini fyri 2014 ikki skal liggja í øki 6 "Tekniks mál", men undir øki 3 "Børn og ung". Tí verður neyðugt at gera eina tekniska eykajáttan millum hesi bæði økir, sum ber við sær at játtanin verður flutt.

Sambært góðkendu fíggjarætlanini fyri 2014 vórðu avsettar kr. 300.000,00 á øki 6, rakstrarstaði 06381153010 "vegir" konto 160001, men verður sambært Fíggjarmálaráðnum neyðugt at flyta játtanina til øki 3, rakstrarstað 03241253010 "Ung í arbeiði" konto 111200.

Sostatt kemur konto 160001 á vegakontoini at verða lækkað úr kr. 1.000.000,00 niður í kr. 700.000,00, meðan játtanin til ung í arbeiði á øki 3 verður hækkað við kr. 300.000,00.

Hinvegin er staðfest, at nýtslan á rakstrarstaði 03241253010 "Ung í arbeiði" fyri allar konti hevur verið pr. d.d. kr. 480.755,00, og er her sostatt talan um eina meirnýtslu upp á kr. 180.755,00 í mun til upprunajáttaanina.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. november 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 180.755,00 til "Ung í arbeiði", rakstrarstað 03241253010 allar konti fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Somuleiðis verður mælt býráðnum til, at flyta kr. 300.000,00 frá øki 6, rakstrarstaði 06381153010 til øki 3 "Ung í arbeiði" rakstrarstað 03241258010, soleiðis at samlaða játtanin til Ung í arbeiði kemur at verða kr. 480.755,00, sum er staðfesta nýtslan.

Fíggingin verður fingið til vega av meirinntøkum av A+B skatti, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Staðfest er pr. d.d., at kommunan hevur fingið umleið kr. 3,7 mió. meira í kommunuskatti enn mett teir fyrstu 10 mánaðarnar av árinum.

Sostatt metir nevndin, at eingin trupuleiki skuldi verið fyri, at eykajáttanin verður veitt av meirskatti. Tó hevur kommunan framt eykajáttanir higartil fyri kr. 3.170.000,00, sum eru fíggjaðar av meirskatti og møguligari lántøku.

Ein eykajáttan, sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í kinsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

Málið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi 27. november 2014 og varð samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 11. desember 2014. (9-0). Gjørt varð vart við av Birgiri Petersen, at játtanin, sum býráðið hevur veitt til eitt nú til ung í arbeiði í fíggjarætlanini fyri 2014 skal halda.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttanina til rakstur "Ung í arbeiði", hetta sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini í málinum. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.35.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Símun Jákup Eliassen

Árant Berjastein

Birgir Petersen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen